## Ítróttarferðsla

Tvey stór tiltøk í Havn í morgin – stuðulstiltak á Tórsbreyt klokkan 13 og fimleikaframsýning á Hálsi klokkan 14 – ávirka ferðsluna, so tí verður onnur vegbreytin á Hvítanesvegnum/Ringvegnum niðan til rundkoyringina við Sundsvegin stongd millum klokkan 13.10 og 13.20. Politi og hjálparfólk dirigera ferðsluni frá rundkoyringini við Sundsvegin og oman eftir Ringvegnum, meðan ferðslan frá Hvítanesvegnum verður send yvir við Strond.



## Ljósið á Hálsi

Seinnapartin í morgin hevur fimleikafelagið Ljósið árligu framsýningina hjá felagnum. Lagt verður fyri klokkan 14 við teimum yngru liðunum, og klokkan 18 verður so framsýning fyri teimum eldru liðunum. Limatalið er í vøkstri, og tí er neyðugt hjá Ljósinum at hava tvær framsýningar. Fleiri hundrað íðkandi hava verið í gongd í vetur, og felagið hevur einar hálvthundrað leiðarar at taka sær av mongu fimleikarunum.

# oyameistari







## Vit ætlaðu meira í ár

Kvinnurnar hjá Tjaldri máttu eftir dystin í gjárkvøldið finna seg í at vera áskoðarar, meðan tær hjá Stjørnuni og allir norðoyingarnir fegnaðust um føroyameistaraheitið. Ein av spælarunum var Annika Thomsen, sum staðfesti, at hetta gjørdist ikki kappingarárið hjá Tjaldri.

– Vit vildu sjálvandi ynskt, at tað vóru vit, sum vóru so glaðar, sum tær eru nú. Vit vita jú, hvussu stuttligt tað kann vera, tí fyri einum ári síðani vóru tað vit, ið fegnaðust, segði Annika, ið viðgongur, at tingini ikki gingu tann vegin, Tjaldur vildi hava tey at ganga í vetur.

– Nei, vit ætlaðu at stíla hægri í ár enn í fjør, men stórar útskiftingar hava merkt okkum. Onkrar hava verið skaddar og onkur upp á vegin, so tí hava vit havt trupult við at fingið spælið nóg flótandi.

Hinvegin var hon errin av, at Tjaldur kom so væl aftur í dystinum í gjárkvøldið, tá tað mitt í seinna hálvleiki eydnaðist at koma upp á javnt.

– Vit fingu verjuna at koyra væl, umframt at vit fingu tey málini, sum annars hava manglað. Men tað rakk bara ikki alíkavæl. Tær hava munin, tí tær kunnu alla tíðina skifta út og seta spælarar inn, sum hava orkuna. Tað kunnu vit ikki, sigur Annika.

hil

## Eitt Tjaldur í maskinuna

Ein av royndu spælarunum hjá Stjørnuni, Annika Ljósstein, sum serliga ger vart við seg í verjuni, ásannaði eftir dystin ímóti Tjaldri í gjárkvøldið, at tað bleiv meira spennandi, enn ætlanin var:

– Nei, hetta høvdu vit ikki ætlað. Vit høvdu ætlað at koyrt tað trygt heim, men har kom eitt Tjaldur í maskinuna. Men nú liðugt er, er hetta bara heilt ótrúligt. Tað hevur verið keðiligt, at meistaraheitið hevur verið í Runavík, men nú er tað so komið heimaftur, segði hon.

– Tað gjørdi tað ikki verri, at vit máttu kempað eitt sindur meira fyri tí nú ímóti endanum. Hetta hevur verið eitt gott kappingarár, men tað hevur verið keðiligt, at mótstøðan ikki hevur verið so stór í ár. Tað er altso ikki so stuttligt at vinna í heilum við 10-15 málum.

hil

## Hart fyri eitt veikt hjarta

Formaðurin í Stjørnuni, Kristoffur Ragnarsson, viðgekk eftir dystin, at tá Tjaldur kom upp á 16-16 mitt í seinna hálvleiki, fór hann at hugsa um pengakassan. Hevði Tjaldur vunnið í gjárkvøldið, hevði ein triði finaludystur verið leygardagin, og tað hevði sjálvsagt givið Stjørnuni klingandi krónur í kassan…

– Tað kanska hevði verið gott fyri kassan, men var ringt fyri nervarnar. Nú havi eg ikki so øgiliga gott hjarta, so eg var eitt sindur bangin, viðgekk Kristoffur, ið annars ikki spardi upp á rósurnar til kvinnurnar hjá Stjørnuni, ið hava vunnið alt í ár.

– Kvinnurnar eru ótrúligar, og tað eru bara bestar. Eg skal einki taka frá Tjaldri, men eg haldi, at okkara kvinnur eru bara tað betri. Hetta hevur verið eitt ótrúligt kappingarár, sum úrslitið eisini vísir, men tað er gott, at vit hava fingið føroyameistarasteypið aftur í húsið. Eg havi saknað tað.

Kristuffur vil ikki siga so nógv um, hvussu tað fer at síggja út hjá Stjørnuni næsta kappingarár, men hann væntar, at liðið fer at hava somu breidd og kanska heldur verður betri, enn nakað annað.

hil

## Kent trýstið alla tíðina

Tann av útispælarunum hjá Stjørnuni, sum helst hevur havt størsta týdningin fyri, at liðið nú aftur er á ovastu rók, er óivað Simona Petersen, sum má vera favorittur at gerast ársins spælari hjá kvinnum í vetur. Hon var øgiliga fegin eftir dystin í gjárkvøldið.

– Eg haldi, at eg eri glaðari enn vanligt fyri hetta meistaraheitið, og tað kemst kanska av, at vit taptu í fjør. Men nú hava vit so fingið hetta steypið aftur, sigur Simona, ið viðgongur, at hon sjálv eisini hevur havt eitt gott kappingarár:

– Jú, tað kanst tú gott siga, at hetta hevur verið eitt gott ár hjá mær. Hetta er kanska ikki mítt besta ár, síðani eg kom til Føroya at spæla hondbólt, men hetta hevur nokk verið tað næstbesta.

Hóast Stjørnan hevur verið oddaliðið mesta av tíðini og serliga ímóti endanum vísti seg at vera í serflokki besta liðið, heldur Simona Petersen ikki, at greipan hevur givið seg sjálva.

– Eg haldi, at vit alla tíðina hava kent trýstið frá Tjaldri, men tá tað ráddi um ímóti endanum, haldi eg, at vit vístu, at vit hava besta liðið, sigur hon.

hil